FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2015

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.tinganes.fo

# RØÐA LØGMANS

**Harra formaður!**

Føroyska samfelagið hevur viðrák í løtuni, og vit eru á rættari kós. Fólkatalið veksur aftur. Arbeiðsloysið er lágt og alsamt lækkandi. Vit hava ongantíð útflutt so nógv sum nú, skattainntøkurnar eru stórar, og samlaðu lønargjaldingarnar vaksa. Bruttotjóðarúrtøkan veksur eisini.

Eg fegnist um, at vøkstur og framburður eru í okkara landi.

Komandi ár verður aftur avlop á fíggjarlógini. Sostatt hevur samgongan rokkið høvuðsmálinum, hon setti sær í samgonguskjalinum. Hetta er eitt bragd, tí fyri fáum árum síðan var landskassahallið slakar 700 mió. kr. Takið hevur verið tungt, men tá ið vit lyfta í felag, er einki ógjørligt.

Kortini er spenningur í politisku skipanini, nú løgtingsval nærkast.

Politiska støðan broytir tó ikki ta sannroynd, at føroyska samfelagið er á rættari kós.

Tíðin gongur skjótt, og lætt er at gloyma. Fyri bert fáum árum síðan var kreppa. Stórar fyritøkur fóru av knóranum, og stórt arbeiðsloysi var. Dapurskygni valdaði í vinnu og húsarhaldum.

Men nú er gongdin vend.

Gongdin er vend, tí vit hava arbeitt hart og miðvíst alt samgonguskeiðið. Landsstýrið gjørdi rættar raðfestingar og hevur minkað hallið og tálmað almennu útreiðslurnar. Samstundis varð búskapurin stimbraður fyri at varðveita vælferðina. Vit hava fingið búskapin á rættkjøl.

Landsstýrið flutti ikki einsamalt tjóðina frá kreppu til vøkstur. Tað eru allar hendurnar, heilarnir og hjørtuni í Føroyum, sum saman hava ført okkum úr kreppuni og skapt vøkstur og vælferð.

Tað gekst illa, men nú gongst væl. Vit vóru í kreppu, men nú er vøkstur og framburður.

Vit eiga at halda kósina og siga nei til at eksperimentera við okkara búskapi og vælferð.

***

**Harra formaður!**

Hetta er seinasta ólavsøkurøða í hesum valskeiði. Tí líti eg í røðu míni aftur á avrik hjá landsstýrinum seinastu árini. Og framtíðar avbjóðingar hjá okkara tjóð verða eisini nevndar.

Samgongan setti sær fyri at stýra búskapinum við skili og fastari hond, so vit kundu loysa umfatandi avbjóðingar, uttan at vælferðin varð sett í vanda. Tað hevur eydnast. Tað er við stórum nøgdsemi og takksemi, at vit kunnu staðfesta, at málini eru rokkin.

Tann nógv umstríddi skattalættin var neyðugur og hevur avgjørt sín lut í búskaparvøkstrinum. Uttan skattalættan vóru búskaparligu lyklatølini neyvan so góð, sum tey eru.

Fólkavakstrarætlan er gjørd, og fleiri átøk eru framd.

Góða samfelagsgongdin sæst aftur í fólkatalinum. Minking í fólkatalinum er vend til fólkavøkstur. Vit tátta nú í 49.000 fólk.

Álitið á framtíðina er stórt. Tað vísir stóri hugurin at gera íløgur. Bjartskygnið hjá landi, kommunum og vinnulívi er eyðsýnt – fleiri stórar verkætlanir eru í gongd kring landið.

Fyri byggivinnuna hava mongu verkætlanirnar stóran týdning. Fyri samfelagið hevur økta byggivirksemið eisini stóran búskaparligan týdning. At tað verður lagt so nógv fyri, er besta tekin um, at áræðið er stórt, og vónin um framtíðina er bjørt.

Men avbjóðingar eru framvegis í búskapinum, og tað er púra natúrligt. Tann størsta avbjóðingin er at tryggja ein haldføran búskap.

Búskapurin er ikki haldførur yvir langt áramál. Neyðugt er at seta í verk varandi tiltøk á inntøku- og útreiðslusíðuni hjá tí almenna fyri at tryggja, at inntøkur og útreiðslur samsvara sum frá líður. Neyðugt verður við fleiri nýskipanum fyri at loysa hesa avbjóðing. Landsstýrið hevur tikið fyrsta stig við nýggju pensjónsnýskipanini.

Vit komu ikki á mál á øllum økjum. Tað var ein stór avbjóðing at finna semju um fiskivinnunýskipanina, men flokkarnir stóðu tíverri ov langt hvør frá øðrum. Tí eydnaðist ikki at finna semju.

Ríkisveitingin er stórur partur av okkara inntøkugrundarlagi, og tí er alneyðugt, at vit ikki eksperimentera við at minka ríkisveitingina.

Eg vóni veruliga, at landsins kosnu menn og kvinnur duga at finna breiðar semjur um at tryggja framtíð Føroya.

***

**Harra formaður!**

Landsstýrið hevur tikið týðandi stig fyri at bøta um korini hjá børnum okkara.
Lógin um barnavernd varð endurskoðað í 2012. Barnaverndarøkini eru nú skipað í størri eindir.

Fráboðanarskyldan í barnaverndarmálum hjá bæði myndugleikum og vanligum borgarum er herd, og fakligu krøvini hjá starvsfólkum í barnaverndarumsitingini eru eisini herd. Størri eindir styrkja fakliga førleikan, umframt at trygdin hjá tí einstaka gerst munandi betri.

Barnahúsið læt upp í 2013. Tað virkar sum karmur um tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar í málum um kynsligan ágang og harðskap. Endamálið við hesi tænastu er, at børnini skulu fáa eitt gott heildartilboð um hjálp og viðgerð á einum og sama stað. Tað hevur víst seg, at stórur tørvur er á Barnahúsinum, sum hevur viðgjørt nógv mál, síðan tað varð sett á stovn.

Vit hava eisini fingið ein barnaumboðsmann. Hetta er ein týdningarmikil liður í at tryggja barnarættindini, sum ásett eru í ST-barnarættindasáttmálanum. Umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur sjálvur mál upp og fer á eftirlitsvitjanir á stovnum, har børn eru.

Børn við serligum tørvi skulu fáa tey tilboð, teimum tørvar rættstundis. Tí er alneyðugt, at ymsu myndugleikarnir, ið varða av tilboðunum, samstarva væl soleiðis, at børnini fáa eitt heildartilboð. Sjøtul er tí settur á arbeiðið at samskipa tænasturnar, sum ymisku myndugleikarnir veita børnum við serligum tørvi.

Stig eru tikin til at skapa karmar, so at børn kunnu fáa neyðug tilboð í heimligum umhvørvi, og eru broytingar framdar í lóggávu, ið veita heimild at stovna fleiri tilboð.

**Harra formaður!**

Familjan er kjarnueindin í samfelagnum. Øll vinna, tá ið familjurnar trívast. Styrkin í familjuni er styrkin í samfelagnum.

Hjúnabandið er ein sterkur karmur um menning og trivnað hjá okkara børnum.

Vit vilja geva børnunum bestu kor og umsorgan. Vit eiga at geva teimum bestu byrjanina til lívið.

Tá ið vit eru góð við familjurnar og skapa góðar fortreytir fyri trivnaði, byggja vit land.

Ofta leggja vit so stóran dent á einstaklingin, at vit gloyma tað mest grundleggjandi samfelagið, ið er familjan.

Hagstovan staðfestir, at í Føroyum liva fleiri familjur í fátækraváða. Tað er ein avbjóðing hjá landsstýrinum og hjá okkum øllum.

Landsstýrið leggur nú seinastu hond á lógaruppskot um familjuískoyti. Uppskotið tryggjar støkum uppihaldarum og barnafamiljum við lágum inntøkum ein styrk, sum munar. Lat meg kortini sláa fast, at passivar peningaveitingar eina loysa ikki avbjóðingarnar. Tað er neyðugt, at hvør einstøk familja raðfestir skilagott við teimum møguleikum, sum eru.

Eg haldi ikki, at tað er rætt at leggja alla ábyrgd á tað almenna. Vit mugu sjálvandi eisini taka ábyrgd sum borgarar. Vit eiga framhaldandi at taka okkum væl av hvør øðrum og hjálpa familjum í trongstøðu.

***

**Harra formaður!**

Vit framdu eina av størstu nýskipanunum í nýggjari tíð, tá ið eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita. Størsta broytingin er, at vald og gjald fylgjast. Nú eru tað kommunurnar, ið umsita eldraøkið, og avgerðirnar verða tí tiknar tættari borgarunum.

Fyri fyrstu ferð hava vit fingið eina eldralóg, sum tryggjar sjálvsavgerðarrættin hjá okkara eldru. Endamálið við lógini er at veita borgarum, sum hava brúk fyri hjálp, eina samskipaða heildartænastu.

Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum varð sett í verk í 2012. Talan er um 18 ítøkilig átøk, sum millum annað snúgva seg um upplýsing, undirvísing og viðgerðartilboð. Øll hesi átøkini eru sett í verk ella eru á veg.

Tað hevur verið sera átrokandi at útvega nøktandi bútilboð til fólk við serligum avbjóðingum. Fleiri byggiætlanir eru framdar ella eru í gerð. Sambýlið Eystan Heyg í Tórshavn til fólk við sálarsjúku læt upp í fjør. Og nýggi depilin til fjølbrekað børn og ung í Runavík læt eisini upp í fjør. Í næstum lata tvey sambýli upp í ávikavist Norðoyggjum og Eysturoynni, umframt at sjøtul er settur á stóra útbyggingarætlan i høvuðsstaðnum.

***

**Harra formaður!**

Allir útlendingar í landinum skulu kenna seg hjartaliga vælkomnar. Teir eru eitt týdningarmikið íkast til samfelagið. Vit skulu gera alt, sum stendur í okkara makt, at fáa tey at gerast partur av samfelagnum so skjótt og væl sum til ber.

Skal tað eydnast, er neyðugt, at vit øll taka lógvatak saman: land, kommunur, felagsskapir og einstaklingar.

Landsstýrið hevur tikið stig til at skipa serlig undirvísingartilboð í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum fyri útlendingum, sum ikki duga norðurlendskt. Skeiðini eru 400 tímar og hava verið skipað í Klaksvík og í Tórshavn.

Sjøtul er settur á arbeiðið at skipa framhaldsskeið og at gera námsætlan fyri undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum. Og skjótt verður integrasjónssamskipari settur.

***

**Harra formaður!**

Fróðskaparsetur Føroya helt 50-ára stovningardag herfyri, og føðingardagsbarnið spennir framvegis bogan hart.

Ongantíð áður hava so nógv lesandi verið á Fróðskaparsetrinum, og ongantíð áður hava so nógvar útbúgvingar verið bjóðaðar út. Høvuðstakið nú er at útvega stovninum góðar og nøktandi hølisumstøður.

Uttan ídnar og dugnaligar hendur var mangan soltið í Føroyum. Vit byggja land bæði við bókligari vitan og hegnigum hondum.

Tað er gleðiligt, at alsamt fleiri útbúgvingar verða bodnar út í Føroyum. Útboðið er fjølbroytt og er við til at tryggja førleikar, sum krevjast til at tryggja vælferðina og menna okkara land.

Lóg um førleikameting kom í gildi í 2014. Sambært hesi lóg hava 25 ára gomul og eldri møguleika at fáa allar sínar førleikar mettar og viðurkendar við atliti at einari útbúgving ella fyri at betra støðuna hjá fólkum við lítlari ella ongari útbúgving. Málið er at geva teimum fleiri møguleikar á arbeiðsmarknaðinum.

Førleikastovur eru skipaðar í fólkaskúlunum kring landið, soleiðis at faklig ráðgeving er á staðnum við atliti at lesing og trivnaði. Og við hesum kunnu næmingar við serligum avbjóðingum fáa munagóða hjálp á staðnum.

Í vár fóru vit undir at tryggja eina skipaða tilgongd fyri børn og ung við autismu. Í hesum sambandi er játtanin økt til Sernám, so bíðitíðin til sálarfrøðing styttist munandi.

Tað var ein stórur dagur, tá mikrofilmslesararnir á Landsbókasavninum á móðurmálsdegnum í ár vórðu avloystir av talgildari tøkni, og føroysku bløðini frá 1877 til 1999 gjørdust tøk á netinum. Við at talgilda bløðini fingu vit øll atgongd til hesar týðandi søguligu keldur um okkara samtíð.

Tað er ókeypis at brúka orðabøkur, tí landsstýrið saman við Kommunufelagnum hevur skipað fría atgongd til netorðabøkur. Hetta er galdandi um allan knøttin til frama fyri føroyska málið og málsligu menningina.

Tað er nú vorðið lættari hjá okkara listafólki at fara út um landoddarnar at marknaðarføra sína list, og samstundis seta Føroyar á heimskortið. Her verður hugsað um nýggju stuðulsskipanina, nevnd Loftbrúgvin, sum er samstarv millum Atlansflog, Tórshavnar kommunu, Norðurlandahúsið og Mentamálaráðið. Til ber at søkja henda stuðul alt árið.

**Harra formaður!**

Tað var ein rørandi løta, tá ið fótbóltslandsliðið hjá monnum á øðrum sinni vann á Grikkalandi. Hesa ferð á einum útbygdum og fullsettum Tórsvølli.

Rørsla er týdningarmikil fyri kropp og sál. Rørsla kann eisini vera kraftmikil og estetisk, og tað sannaðu vit, tá Føroyar í summar vóru vertir fyri heimsmeistaraskapinum í estetiskum fimleiki.

Fimleikasambandið framdi eitt satt bragd og vísti, at vit megna at hýsa stórum altjóða tiltøkum, og okkara filmleikagentur framførdu estetiska fimleikin í heimsflokki. Landsstýrið er fegið um at hava verið við til at stuðla hesi næststørstu ítróttagrein her á landi.

Ítróttin er í blóma. Landsliðsarbeiðið hjá Hondbóltssambandinum er víðfevnt og miðvíst. So miðvíst, at manslandsliðið vann "Emerging Nations Cup" í Kosovo í summar.

Okkara ítróttarfólk hava enn einaferð gjørt vart við seg á oyggjaleikunum. Eg havi sæð á oyggjaleikunum á Jersey, hvussu íðin og okkara ítróttarfólk eru. Serliga rørandi og sterkar eru løturnar, tá ið ein av okkara vinnarum stígur upp á sigurspallin og tekur ímóti heiðursmerki. Og Merkið ber boð um føroyskan tjóðskap og felags samleika. Vit hava sterkar kenslur, tá ið tjóðsangurin ljómar.

Vit eru errin av tykkum øllum!

***

**Harra formaður!**

Ein væl virkandi og skjót tilbúgving á sjógvi og landi er alneyðug. Í summar gjørdi landsstýrið avtalu við Atlantsflog um nýggjan sáttmála um tyrlutænastu.

Sáttmálin gevur eina munandi betri tænastu. Ferðafólk fáa við nýggjum tyrlum eina betri og skjótari tænastu, og sjófólk okkara kunnu kenna seg tryggari heilt út á 200 fjórðingar. Nýggju tyrlurnar eru størri, tryggari og skjótari.

Í næstum verður farið undir at dagføra samskiftisútgerðina til sjóbjarging.

**Harra formaður!**

Menningin í heilsuverkinum er stór, og alsamt fleiri fólk fáa viðgerðir, sum ikki vóru møguligar fyri bert fáum árum síðani.

Viðgerðir í heilsuverkinum gerast betri, og fleiri søkja sær heilsubót. Neyðugt at fyribyrgja soleiðis, at flest fólk kunnu liva eitt heilsugott lív longri og hava minni tørv á viðgerð. Tað er endamálið við heilsunýskipanini.

Í mong ár hevur tað verið ein trupulleiki, at fólk eftir væl eydnaða viðgerð á sjúkrahúsi ikki hava fingið neyðuga endurvenjing. Avleiðingin er, at summi hava fingið afturstig, og tí eru endað aftur á sjúkrahúsi. Tað hevur givið sjúklingunum óneyðugan ampa, og heilsuverkinum óneyðugar útreiðslur.

Hetta hevur landsstýrið broytt. Tann 1. juni í ár fingu borgarar rætt til ókeypis endurvenjing í sjúkrahúsverkinum, eftir at Løgtingið í vár samtykti at broyta sjúkrahúslógina.

Økispsykiatrisk tænasta verður sett í verk í Suðuroy í næstum, og Sandoyggin og Vágarnar fáa eisini skipaða psykiatriska tænastu í ár.

Bíðitíðin til barna- og ungdómspsykiatri er stórt sæð burtur. Tað er eitt veruligt frambrot.

Tá ið landsstýrið tók við við ársenda í 2011, vóru 161 børn og ung á bíðilista. Bíðitíðin var út við hálvt triðja ár. Í dag eru á leið 20 børn á bíðilista. Hetta er úrslit av miðvísum arbeiði.

***

**Harra formaður!**

Stóra verkætlanin Talgildu Føroyar er farin av bakkastokki. Endamálið er at veita borgarum og vinnu betri tænastur og fremja stórar effektiviseringar í almenna geiranum. Harafturat fer tað at skapa nýggjar vinnumøguleikar og styrkja kappingarførið.

Vit eru longu frammarlaga á fleiri økjum. Vit eru nú til reiðar at fara undir at talgilda alt samskifti millum borgarar og almennar myndugleikar, og at byggja eitt trygt talgilt undirstøðukervi fyri vinnu og borgaran. Samstundis er týðandi at tryggja, at øll fáa atgongd til Talgildu Føroyar – ung sum eldri.

Avbjóðingarnar í samfelagnum gerast alsamt størri, og vit kunnu ikki longur einans dúva upp á gamlar loysnir og arbeiðshættir. Vit mugu bróta slóð til tess at menna samfelagið uppaftur meira.

**Harra formaður!**

Størsta avbjóðingin hjá føroyskum íverksetarum er atgongd til váðafúsa fígging. Nógv nýskapandi vinnuhugskot koma fram, sum bróta so nógv frá tí kenda, at føroyskir íleggjarar aftra seg við at veita fígging.

Landsstýrið hevur tryggjað føroyskum íverksetum atgongd til danska Vækstfonden. Grunnurin veitir m.a. veðhald fyri lánum, sum bankarnir lata virkjum til menningar- og vakstrarætlanir.

Landsstýrið hevur bøtt møguleikarnar hjá nýútbúnum føroyingum at finna sær starv her á landi. Avtalað er gjørd við danskar myndugleikar um, at føroysk nýútbúgvin kunnu flyta til Føroyar og fáa arbeiðsloysisstuðlin við sær í upp til tríggjar mánaðir. Hetta bøtir um teirra møguleikar at søkja starv her heima.

Vindur sum orkukelda hevur mangan havt mótvind í Føroyum. Tað hevur hon ikki longur. Vindorka hevur nú veruliga undanvind. Grøna kollveltingin setur Føroyar á breddan á orkuøkinum. Í fjør var fyrsta

árið, at meir enn helmingurin av elorkuni kom frá varandi orkukeldum. Vit hava meir enn ferfaldað elframleiðsluna úr vindorku seinastu fýra árini.

Eg eri sera fegin um, at SEV og myndugleikarnir í ár samdust um eina felags ætlan, sum skal bera landið enn longur fram á grønu orkuleiðini.

**Harra formaður!**

Tann 20. mars í ár hugdi allur heimurin at okkum. Undir fullu sólarmyrkingini vóru fleiri enn 11.000 ferðafólk í Føroyum. Hetta er hægsta ferðafólkatal nakrantíð. Vit fyrireikaðu okkum væl, og vit fingu eina uppliving fyri lívið. Visit Faroe Islands og ferðavinnan gjørdu eitt megnararbeiði.

Tað var ein skilagóð raðfesting hjá landsstýrinum at tvífalda játtanina til Visit Faroe Islands. Ferðavinnan er í støðugum vøkstri, og nógv orka verður løgd í at marknaðarføra Føroyar uttanlands.

Eisini alivinnan blómar. Ein glógvandi virkishugur og eitt stórt framskygni eyðkennir okkara alivinnu.

Alivinnan eigur sín stóra lut í góðu búskapargongdini. Alilaksur er nú okkara størsta einstaka útflutningsvøra. Og hon bjóðar framtíðini av. Fleiri stórar og spennandi íløgur verða gjørdar. Tær skulu tryggja, at føroysk alivinna framhaldandi verður millum tær bestu í heiminum. Stórar íløgur verða gjørdar í nýggjar smoltstøðir, kryvji- og góðskingarvirki og nýggjar brunnbátar.

Kortini er sera umráðandi, at vit áhaldandi hava atlit at lívfrøðiliga haldførinum. Hesa avbjóðing taka vinnan og almennu myndugleikarnir í størsta álvara, og partarnir samstarva fyri at tryggja framhaldandi burðardygga alivinnu.

***

**Harra formaður!**

Støðan í botnfiskavinnuni seinastu árini hevur ikki verið góð orsakað av vánaligari tilgongd. Landsstýrið hevur tó tryggjað vøkstur innan botnfiskavinnuna á fjarleiðum. Veiðan í russiskum og norskum øki, eins og á Flemish Cap, hevur verið rímiliga stór seinastu árini samanborið við onnur ár.

Í hesum samgonguskeiði setti landsstýrið sær fyri, at allur vinnuligur fiskiskapur skuldi verða skipaður og lýstur í kunngerð. Tørvur er á nógvum kunngerðum. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis, og komið verður á mál um stutta tíð.

Stórur vøkstur hevur verið í uppsjóvarvinnuni seinastu árini.

Eftir drúgvar samráðingar, ið vardu í fleiri ár, eydnaðist okkum at leggja avtaluna við onnur lond um makrelveiðu í nýggja legu. Føroyski luturin av kvotuni gjørdist munandi størri, samstundis sum størri partur av fiskiskapi og framleiðslu fóru fram í føroyskum sjó- og landaøki.

Vit rukku góðu úrslitunum, tí tjóðin stóð saman. Eisini hetta er ein týðandi liður í búskaparligu framgongdini seinastu árini.

Uppsjóvarskipini hava fingið til høldar risastór virði. Uppsjóvarvirki eru bygd á Tvøroyri og í Fuglafirði, og skapa tey inntøkur til nógv húski og til tað almenna.

***

Aftur í ár royna felagsskapir at forða okkum í at drepa grind.

Støðan hjá landsstýrinum í hesum máli er greið. Vit halda fast við okkara rætt at drepa grind. Stovnurin er ikki hóttur, veiðan er burðardygg og væl skipað, og djóravælferð er í hásæti. Føroyingar hava dripið grind í øldir, og grindin er framvegis eitt kærkomið ískoyti til húsarhald kring landið.

Landsstýrið, løgreglan og kommunur arbeiða saman um at tryggja, at drápini kunnu ganga væl. Nýggja grindalógin, ið hevur til endamáls at tryggja, at grindadráp ikki verður órógvað av óviðkomandi, hevur verið fyri atfinningum, tí hon ásetur harða revsing fyri ikki at boða frá grind.

Eg haldi, at vit eiga at eftirmeta hesa lógina í heyst og vita, um tað er skilagott at taka hesa atfinning til eftirtektar.

***

**Harra formaður!**

Føroyar hava rikið ein virknan og miðvísan uttanríkispolitikk hetta samgonguskeiðið. Fleiri stór mál eru loyst hegnisliga.

Úrslitini tala fyri seg. Nýggjur fríhandilssáttmáli við Turkaland, størri uppsjóvartilfeingi, størri landgrunsøki, dagførdur granskingarsáttmáli við ES og sendistova í Russlandi vísa, at stór stig eru tikin.

Fyrr í ár var eg á fundi við forsetan fyri Altjóða Olympisku Nevndina, IOC. Vit avtalaðu at seta ein felags arbeiðsbólk at kanna tilgongdina viðvíkjandi føroyskum limaskapi í IOC, umframt at vit skulu menna samstarvið millum partarnar. Eg vóni, at samstarvið fer at menna okkara ítrótt enn meira.

Eg haldi meg ikki siga ov nógv, tá ið eg staðfesti, at sjáldan áður hava vit rokkið so góðum úrslitum á altjóða pallinum, sum júst hetta valskeiðið. Sum tjóð kunnu vit kortini ikki seta okkum afturá og bara njóta framd avrik. Tað tryggjar ongan framburð, og framtíðar avbjóðingarnar eru stórar.

Handilsviðurskiftini við útheimin eru tað týdningarmesta uttanríkispolitiska økið í løtuni. Vit virka fyri at fáa fleiri fríhandilssáttmálar. Eisini er stórur tørvur á at endurnýggja okkara samstarv við ES. Ein dagførdur handilssáttmáli við ES skal geva okkum møguleika at virðisøkja okkara fyrstafloks rávøru – eisini uppsjóvarfisk – til tann fólkaríka evropiska marknaðin.

***

**Harra formaður!**

Kanningin av tunnilsmálinum er liðug, og sum vera man, verður kjakast um niðurstøðurnar.

Kanningarstjórin sigur í sínari niðurstøðu, at eg havi brotið lógina um ábyrgd landsstýrismanna við at geva Tinginum skeivar upplýsingar við at siga, eftir mínari táverandi fatan, at eg ongan leiklut hevði í break fee-avtaluni. Tað harmar meg almikið, og eg havi biðið Løgtingið um umbering fyri tað. Men eg eri sjálvandi fegin um, at tað í kanningini verður staðfest, at eg sum løgmaður ikki havi sett mína eftirlitsskyldu til viks sambært stýrisskipanarlógini, og at heimild var fyri at gera break fee-avtaluna.

Heimild var eisini fyri at gera tunnilsavtalu við privata felagið, og ongin ábreiðsla varð fingin fyri at hava avtaluuppskotið í trúnaði. Harafturat var tað ikki brot á lóg um ábyrgd landsstýrismanna, at Løgtingið ikki varð kunnað um ávísa innanhýsis uppritið, ið so nógv varð tosað um.

Alt hetta eru viðurskifti, ið fleiri serfrøðingar, miðlar og ikki minst andstøðan hartaði okkum harðliga fyri undan kanningini.

Hondina á hjartað – tá ið eg í juni 2013 noktaði landsstýrismanninum í innlendismálum at undirskriva CIP-sáttmálan og álegði honum at leggja málið fyri Løgtingið, vardi tað meg als ikki, at so nógv rumbul skuldi spyrjast burturúr.

***

**Harra formaður!**

Skjótt verður løgtingsval. Tá fær veljarin høvi at gera sína ávirkan galdandi. Tað nyttar ikki at billa fólki inn, at komandi árini verða løtt. Vit hava góðar møguleikar at varðveita eitt trygt og sterkt vælferðarsamfelag. Men til tað krevst, at vit ikki fara at eksperimentera við tí vakstrartilgongd, sum henda samgonga hevur lagt lunnar undir.

Heldur vil eg endurtaka, at hildið má vera fast við varna og miðvísa búskaparpolitikkin seinastu árini og í ávísan mun herða hann.

Einki gildi er ókeypis. Rokningin kemur so ella so. Tí hevur samgongan eisini í hesum valári latið vera við gjara út í eystur og vestur. Vit hava hildið útreiðslunum aftur fyri at tryggja avlop á fíggjarlógini í 2016.

Tað er ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur.

Samfelagið hevur reist seg eftir fleiri ár í einum aldudali. Hetta hevur verið eitt avbjóðandi tíðarskeið hjá øllum Føroya fólki, men tað hevur samstundis víst, at vit tola mótgongd. Vit gleðast øll um viðrák, men tað er í mótrákinum, at vit vísa okkara sonnu styrki.

Tað eru nógv tekin um, at tann góða gongdin heldur fram. Men vit eiga at leggja okkum í geyma, at eingin vøkstur stendur við. Og okkara búskapur er viðbrekin. Tí er neyðugt nú í góðum tíðum at leggja upp fyri ringum tíðum.

Tíbetur hava vit eitt álítandi trygdarnet undir okkara samfelag. Ríkisfelagsskapurin hevur ofta verið okkum ein tryggur brimgarður. Seinast undir herviligu fíggjarkreppuni, tá ið vit gjørdust partur av bankapakkunum í ríkisfelagsskapinum. Um vit ikki vóru partur av hesi trygdarskipan, høvdu vit eyðsæð ikki komið so væl gjøgnum kreppuna. Eg eri sannførdur um, at ríkisfelagsskapurin nógv ár fram verður ein trygg verja, tá ið á stendur.

Krossurin í Merkinum umboðar okkara virðismikla kristna arv. Hesin arvur er týdningarmikil partur av okkara fólkaræði og samleika.

Vit fara í dag undir seinastu tingsetuna í hesum valskeiði. Eg takki samgongu og andstøðu fyri samstarvið hesi skjótt farnu fýra árini og fari at enda við einum ørindi úr sanginum *O, Føroyar mítt land,* sum Olivar á Ryggi yrkti:

O, Føroyar mítt land, tú hitt einasta eina,
landið, sum liggur mær hjartanum næst,
landið á morgni og kvøldinum seina
tekur meg at sær og heldur mær fast,
landið hitt dýra, vár fedranna arv',
tað er vár skylda væl landið at røkja,
her byggja vit heim og her fremja vit starv
– lat okkum um virðir tess økja.

Eg ynski øllum góða ólavsøku.

Gud signi Føroyar!

# LØGLISTI

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi broyting í rættargangslógini (lov for Færøerne om rettens pleje)**
Uppskotið snýr seg um at fáa til vega grundarlag undir at avhoyra børn og ung við video í revsimálum v.m.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2016**
Fyri 1. oktober 2015 leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum uppskot fyri Løgtingið um løgtingsfíggjarlóg fyri 2016. Løgtingsfíggjarlógin er búskettið hjá landinum. Talan er um uppskot til nýggja løgtingsfíggjarlóg.

**Møguligar eykajáttanarlógir og eykafíggjarlóg**

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017**
Fyri 1. apríl 2016 leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina 2017, býtt á greinar.

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap (fiskidagar)**
Áseting av fiskidøgum fyri fiskiárið 2015/2016 og broyting viðvíkjandi økisskipan og royndarfiskiskapi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan Fiskiskap (troling við skiljirist, eftirlitsreglur o.a.)**
Hetta lógaruppskotið snýr seg um at broyta lógina á tveimum økjum: Sum tað fyrra verður skotið upp at broyta ásetingarnar um trolfriðingar, so at loyvt er at royna við troli við skiljirist ísettari á trimum leiðum, ið eru stongdar fyri at friða smáan upsa. Sum tað seinna verður skotið upp at gera dagføringar fyri at hava neyðugu heimildirnar fyri at seta í verk tær skipanir, sum vit hava átikið okkum í millumtjóða avtalum og samstarvi um fiskiveiðieftirlit og at forða fyri ránsveiðu.

## ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kommunustýrislógini (borgarstjóri ella løgtingslimur)**
Endamálið er at strika heimildina hjá kommunustýrium at heimila fulltíðarsettum borgarstjórum eisini at átaka sær starvs sum beinleiðis fólkavaldur.

**Uppskot til løgtingslóg um familjuískoyti**
Lógaruppskotið er ein liður í arbeiðinum at basa fátækradømi hjá barnafamiljum. Talan verður um at áseta eitt fíggjarligt ískoyti til barnafamiljur við lágum inntøkum.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (gjald fyri liðugt viðgjørdar sjúklingar)**
Endamálið er at seta í verk eina skipan, sum longu verður nýtt í okkara grannalondum, og sum hevur virkað væl. Skipanirnar í okkara grannalondum eru soleiðis, at ásett verður eitt gjald fyri seingjardag, sum kommunurnar gjalda, tá ið tað ikki verður tikið ímóti liðugt viðgjørdum sjúklingum eftir lokna viðgerð – vegna vantandi heimarøkt, eldrasambýli ella røktarpláss. Endamálið er at eggja kommunum til skjótari at taka ímóti teimum liðugt viðgjørdu sjúklingunum. Sjúkrahúsini kunnu tá viðgera fleiri sjúklingar – í staðin fyri at røkta fólk, sum ikki hava meiri sjúkrahúsviðgerð fyri neyðini.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um musealt virksemi**
Nýggj lóg um musealt virksemi, sum kemur í staðin fyri løgtingslóg um fornminnissavn, løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn og løgtingslóg um bygdarsøvn við mentanarsøguligum týdningi. Nýggja lógin er um virksemið hjá landinum á museala økinum, herundir listasøvn, mentanarsøgulig søvn og náttúrusøgulig søvn umframt stuðulskipanir á museala økinum.

## VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta "søloven" í gildi fyri Føroyar**
Endamálið er at seta í gildi nýggja sjólóg fyri Føroyar, ið er í samsvari við lóggávuna á økinum í hinum Norðurlondunum.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum, 1. januar, 1985 til 2015 ..... 19
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2014 ..... 19
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til mars-2015 ..... 19
**Mynd 4:** Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, apríl-1995 til mai-2015 ..... 20
**Mynd 5:** Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali
og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til mai-2015 ..... 20
**Mynd 6:** Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar,
1. ársfjórðingur 1985 til 1. ársfjórðing 2015 ..... 20
**Mynd 7:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2016 ..... 21
**Mynd 8:** Brúkaraprístalið, 2001 til 2015, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100 ..... 21
**Mynd 9:** Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, januar 1996 til mai 2015 ..... 21
**Mynd 10:** Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, januar 1996 til mai 2015 ..... 22
**Mynd 11:** Laksur og síl tikin skift á ár og slag, tús. tons, 1996 til 2014 ..... 22
**Mynd 12:** Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2014 ..... 22
**Mynd 13:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum
nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til mai-2015 ..... 23
**Mynd 14:** Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2014 ..... 23
**Mynd 15:** Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2020 ..... 23
**Mynd 16:** Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og
sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2013 ..... 24
**Mynd 17:** Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2014 ..... 24
**Mynd 18:** Útgoldin A-inntøka umvegis a-skattaskipanina, mió. kr., 1993 til 2014 ..... 24
**Mynd 19:** Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013 ..... 25
**Mynd 20:** Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi í mió. kr. og
% av BTÚ, 1997 til 2014 ..... 25
**Mynd 21:** Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, í mió. kr., 1998 til 2013 ..... 25
**Mynd 22:** Brutto- og nettoskuld hjá føroyskum kommunum og
kommunuskattur, mió. kr., 1993 til 2013 ..... 26
**Mynd 23:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini ..... 26
**Mynd 24:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna ..... 26
**Mynd 25:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna ..... 27
**Mynd 26:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna ..... 27
**Mynd: 27:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur ..... 27
**Mynd 28:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans ..... 28

## Mynd 1: Fólkatal í Føroyum, 1. januar, 1985 til 2014




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

## Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2013




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

## Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, jan. 2007 til mars 2014




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 4: Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, apríl-1995 til mai-2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 5: Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til mai-2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 6: Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfjórðingur 1985 til 1. ársfjórðing 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 7: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2016




* Tølini fyri 2014 til 2016 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Fíggjarmálaráðnum og Búskaparráðnum.

Mynd 8: Brúkaraprístalið, 2001 til 2015, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan

Mynd 9: Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, januar 1996 til mai 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 10: Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, januar 1996 til mai 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 11: Laksur og síl tikin skift á ár og slag, tús. tons, 1996 til 2014




Kelda: Hagstovan

Mynd 12: Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2014




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.

Kelda: Hagstovan.

Mynd 13: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til mai-2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 14: Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2014




* Tølini fyri 2013 og 2014 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 15: Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2020




Viðm.: Tølini fram til og við 2013 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2014 eru mett tøl.
Tølini fyri 2015 eru játtanartøl, og tølini fyri 2016-2020 eru úr uppskotinum til játtanarkarmar.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 16: Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 17: Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2014




Kelda: TAKS

Mynd 18: Útgoldin A-inntøka umvegis a-skattaskipanina, mió. kr., 1993 til 2014




Kelda: TAKS

Mynd 19: Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 20: Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2014




Kelda: Gjaldstovan

Mynd 21: Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 22: Brutto- og nettoskuld hjá føroyskum kommunum og kommunuskattur, mió. kr., 1993 til 2013




Kelda: Hagstovan og TAKS

Mynd 23: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 24: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 25: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 26: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd: 27: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 28: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans




Kelda: Fíggjarmálaráðið